# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo






# bilar í SOSIALINUM MIKUDAGIN

Mikudagin 6. oktober verður eitt stórt bilblað sum inlegg í Sosialinum.

Í blaðnum er m.a. samrøða við 94 ára gamla Jógvan Gerðalíð, ið er elsti klaksvíkingur sum hevur koyrikort og framvegis koyrir bil. Eisini er samrøða við ungan mann av Skálafjørðinum, sum lærir til bilmekanikara í Klaksvík.

Annars eru ymiskar frásagnir frá bilfrontinum sum t.d. at gentur dáma væl sterkar litir á bilum, søgan um ein norðmann sum ætlaði at bakka 30 kilometrar til hús, um pør sum klandrast um koyriveg og ferð í bilin, og um at nýggjar billyktir blenda ikki. Eisini er ymiskt nýtt frá bilshowinum í Paris, og um at føroyingar keypa fleiri bilar.

Vitjað verður eisini á onkrum bilverkstaði. Eisini verður tilfar um lakkering av bilum við vatnbaseraðum lakki.

## FirstStop hjá Ferrari í Marabello




Fríðrikur Bláhamar

FirstStop Føroyar var í síðstu viku boðið við til eina áhugaverda vitjan til Marabello í Italia, har vitjað var á Ferrari verksmiðjuni.

Umframt Ferrari vitjanina var eisini vitjað á einum vín bóndagarði, og á síðsta búplássinum hjá kenda tenorinum Luciano Pavarotti. Bridgestone, sum eigur FirstStop dekk-ketuna, og Ferrari hava í fleiri ár havt eitt tætt samstarv, serliga í sambandi við Formel 1 kappkoyringina, og eiga teir fleiri sigrar saman.



*Ein av teim eldru Ferrari bilunum, ið vóru at síggja á framsýningi*

Hósdagin
7. oktober
kl. 17.10

## BILRADIO

Aktuel biltíðindi við Maggi Gunnarsson

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin 2. oktober er samrøða við Ola Karl Hammer um ein nýggjan dekkverkstað í Hvalvík.

Vitjað verður í Vøruhúsinum á Hjalla, har Sámal Olsen frá lakkdeildini fortelur um eitt nýtt slag av lakki til lakkering av bilum.

Prátað verður við fólk á altjóða eldradegnum, sum var hildin 1. oktober um ellisakfør sum vórðu sýnd fram í Tórsgøtu. Samrøður eru við Finn Johansen, Sverra Mortensen og Mortan Rasmussen.

*Óli Karl Hansen*






*Sverri Mortensen*



*Finnur Johansen*